Sig okkum frá

Hendir okkurt, sum
er áhugvert hjá øðrum at vita,
eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07. Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Sosialurin

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaða kona mín, góða mamma, vermamma, omma og systir okkara

Bodil Tausen
fødd Davidsen, Tórshavn

er heimkallað til Harran 16. mai 2001, 72 ára gomul.

Í sambandi við at kistan kemur í Vesturkirkjuna í dag, verður andakt kl. 17.00.
Jarðarferðin verður sunnudagin 20. mai kl. 14.30.

Vegna tey avvarðandi
Klæmint,
Hans, Jensina og Halda við familjum

Tey, sum vilja minnast Bodil, kunnu geva Meinigheitshúsinum í Havn eina gávu

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

Tór Henriksen
Sandi

andaðist mikudagin 16. mai.

Vegna tey avvarðandi
Tóra

Hassjpípa sløddist í barnagarði

Spæliplássið hjá Drotning Margrethu barnagarðinum í Klaksvík er ótespilig sjón mánamorgnar

UNGDÓMUR
Eyðun Klakstein

Fyri viku síðani tóku starvsfólk í Drotning Margrethu barnagarðinum í Klaksvík hesa heimagjørdu hassjpípuna upp av spæliplássinum hjá barnagarðinum
Mynd: Norðlýsið

Klaksvík: Tá starvsfólkini í Drotning Margrethu barnagarðinum í Klaksvík koma til arbeiðis mánamorgnar, vita tey, hvør fyrsta uppgávan á degnum er.

Tey mugu út á spæliplássið fyri at kanna, um nakað er har, sum kann verða til vanda fyri børnini.

Og vanligt er, at starvsfólkini mugu rudda hópin av fløskubrotum og óruddi av vegnum, áðrenn tey næstan 100 børnini í barnagarðinum sleppa út at spæla. Fyri viku síðani funnu starvsfólkini í barnagarðinum eina heimagjørda hassjpípu, sum sløddist á spæliplássinum.

– Vit eru ógvuliga hørm um støðuna, men vit fáa lítið annað gjørt, enn at heita á ungdómin, um at lata verða við at fara so illa um spæliplássið hjá okkum, sigur Marjun Michaelsen, sum er leiðari í barnagarðinum.

Einki dansistað

Barnagarðurin liggur við fótbóltsvøllin, og har í umráðnum eru eisini onnur stød, sum líða undir einum óumhugsnum ungdómi.

Nýggja skýlið hjá klaksvíkingum verður illa óruddað, alment toilett í umráðnum hevur fleiri ferðir verið verið herverki, og svimjihøllin hevur fingið ein umgang av grafitti.

– Tað ber illa til at seta vaktarfólk at ansa eftir ungdóminum, men støðan er ómetaliga keðilig, sigur Marjun Michaelsen.

– Tað kann vera, at hendan støðan hongur saman við, at ungdómurin ikki longur hevur nakað dansistað at halda til í, sigur hon.

Borgarstjórin í Klaksvík hevur boðað frá, at ætlanin er at gera eitt átak mótvegis ungdóminum í Klaksvík, fyri at fáa hann at fara betri um almennu støðini í býnum.

– Vit eru hart rakt

– Tað er tómligt á hillunum, og um S&K verður verandi í verkfalli, ber illa til at hava opið, sigur leiðarin í FK á Tvøroyri

VERKFALL
Eyðun Klakstein

Suðuroyingar eru hart raktir av verkfallinum, og vøruútboðið í handlunum er nógv skert.

– Tað er tómligt á hillunum, men vit fáa framvegis breyð og mjólk. Hinvegin mangla vit sukur, ger, eplir, frukt og annað, sigur Gert Levisen, leiðari í Keypssamtøkuni á Tvøroyri.

– Vit ætla at hava opið, men um S&K heldur fram við sínum verkfalli, so verður tað sera trupult at hava opið, sigur hann

Í gjár var leiðarin einsamallur til arbeiðis á FK, tí øll hini 8 fólkini vóru farin í verkfall. FK á Tvøroyri stongdi í gjár, og leiðarin brúkti dagin til vøruteljing.

– Um S&K heldur fram við verkfallinum, so verður tað trupult hjá okkum at hava opið, tí øll starvsfólkini hjá okkum eru í fakfelagnum, sigur Gert Levisen.

Hart rakt

Aðrir handlar hava eins truplar umstøður, tí eingin veruligur farmaflutningur hevur verið til Suðuroyar, síðani verkfallið byrjaði.

Treytin fyri, at Smyril sleppur at sigla er, at hann ongan farm tekur, og hesa treyt roynir Strandferðslan at uppfylla.

– Vit eru hart rakt í Suðuroy, so tað er einki at siga til, at vit ynskja, at rættlag kemur íaftur, sigur Gert Levisen.

Stóru matvøruhandlarnir í Suðuroy eru merktir av verkfallinum – bæði tí hjá arbeiðarafeløgunum og hjá S&K – og umframt manglandi vøruútboð stríðast teir nú eisini við vantandi starvsfólk.

Yvirlýsing

Javnaðarflokkurin

Javnaðarflokkurin átalar, at løgreglan einsíðugt fer í part við øðrum partinum, nú hon leggur seg út í verkfallið á privata arbeiðsmarknaðinum.

Verkfalsrætturin er einasta vápnið, løntakararnir hava, og Javnaðarflokkurin stuðlar arbeiðarafeløgunum í teirra moralska rætti at tryggja sær, at verkfalsrakt arbeiði ikki verður gjørt av øðrum.

Givnir at kava

Einki sást til myntirnar umborð á Jólaskipinum, og nú er óvist, um teir nakrantíð koma afturíaftur

SKATTAJAKT
Eyðun Klakstein

Veðrið var ikki til vildar at gera fleiri kavingar í Fuglloyarfirði, eftir at skipsklokkan hjá Sauternes varð funnin týsdagin.

Síðani hevur alda verið í sjónum, og nú streymurin er farin at harðna aftur, er ógjørligt at fara niðuraftur á Jólaskipið í hesum umfari.

Leiðarin fyri skattajaktini í Fugloyarfirði, Heri Andreassen, er nødgur við úrslitið, hóast tað ikki eydnaðist at fáa nakrar av myntunum, sum sigast verða umborð, upp.

Nú er óvist, um hesir myntir nakrantíð koma afturíaftur, tí fleiri kavingar eru ikki í kortunum. Donsku kavararnir, sum hava verið niðri á Jólaskipinum, fara um vikuskiftið aftur til Danmarkar, og so er skattajaktin av á hesum sinni.

Fleiri lutir eru fingnir upp av Jólaskipinum – millum annað skipsklokkan – men enn er óvist, hvar hesir lutirnir skulu goymast.

FM kapping við íslandsrossum

Í dag og í morgin verður onnur FM kappingin hjá Føroyskum Íslandsrossafelag á øki felagsins í Havnadali. Fyrireikararnir vóna, at luttøkan verður eitt sindur betri enn í fyrsta umfari í ár. Í fjør luttóku heili 34 ross og hetta er met síðan felagið varð stovnað í 1989.

Til kappingina í dag verður byrjað við trav og skeiðkappingum á vøllinum hjá Føroya Ríðingarfelag klokkan 10.00. Hildið verður fram klokkan 14:00 við Kráarheyg við innleiðandi umforum í tølt, fjórgongd og fimmgongd.

Sunnudagin verða finalurnar hildnar.

r sl kk n
- nn n f r

-1

f stn tt l f n nn nl n s
N k st r t n ns 32 yru um m nutt n um n
22 yru um m nutt n um n tt n t s t um
f stn tt l f n n nn nl n s.

u t l

f stn tt l f n t l tl n

Sk fr mt n s m n v kkum

T l nt n
KEY IS st vn n v nt rn th l
S 4 , kr.